# Leita eftir flogfari

Í Papua Ný Guinea leita bjargingarlið eftir einum leiguflogfari og teimum 13, sum vóru við tí. Myndugleikarnir siga, at flogfarið gjørdi seg til reiðar at seta seg, tá tað brádliga hvarv av radaraskíggjanum. Ein talsmaður hjá flogfelagnum sigur við Sky News, at tól eru umborð á flogfarinum, sum skulu siga, hvar tað er statt, men at tólið eftir øllum at døma ikki virkar. Sky News sigur, at økið, har flogfarið hvarv, er sera illgongt, og harafturat hevur veðrið darvað leitingini. Millum teirra, sum vóru umborð á flogfarinum, vóru níggju avstralsk ferðafólk.



*Magnus Heinason gjørdi yngul-og ætikanningar í seinnu helvt av juni, og mangt bendir á, at náttúruviðurskiftini á føroyska landgrunninum eru munandi betri, enn tey hava verið seinastu árini. Tí verður væntað, at eitt nú toskurin fer at koma aftur, áðrenn langt um líður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*






*Jákup Reinert og Eilif Gaard kunnu vísa á tað gleðiliga, at nøgdin av toskayngli í ár er nærum tvífalt so stór sum í fjør, sum annars var eitt yvir miðal ár. - Hetta er sera áhugavert.. Kortini eiga vit at hava í huga, at hesin yngul fyrst skal svimja inn undir land, har hann veksur upp í 1-2 ár, áðrenn hann leitar út í tann vaksna stovnin, siga teir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

undan gýtingini í ár, men longu komandi vár fæst vitan um hetta, tá Magnus Heinason fer at gera regluligu yvirlitstrolingarnar.

### Onnur fiskasløg

- Sæð burtur frá metárinum ár 2000, tá sera nógv varð fingið av stórum sildayngli, ið vísti seg at vera summar/heyst gýtandi sild frá árinum fyri, hava bert einstøk sildayngul verið at fingið á yngulkanningunum. Í 2007-2008 var tó ein lítil vøkstur, men lítið varð fingið í ár. Eftir støddini at døma kundi sildin verið gýtt í vár.

Teir báðir vísa í síni frágreiðing á, at eitt fiskaslag, sum er vaksið nógv seinastu árini, er hvítingur. 2008 var tað besta árið nakrantíð, men í ár var munandi minni at fáa.

- Vanligt er at fáa nakað av vaksnum hvítingi í yngultrolið, og hetta er eftir magainnihaldinum at døma fiskur, sum ferðast uppí sjógvin eftir føði. Lutfalsliga lítið varð fingið í ár í mun til onnur ár.

Jákup Reinert og Eilif Gaard siga um vistfrøðina á landgrunninum, at sjógvurin við Føroyar hevur verið rættiliga heitur og saltur seinastu árini, og hendan gongdin heldur fram í ár. Inni á landgrunninum var hitin millum 9,1 og 9,2° C, og uttan fyri landgrunsfrontin var hann heitari.

- Sum vant var sjógvurin eitt vet kaldari eystanfyri enn vestanfyri. Undir landi vestanfyri var sjógvurin sum heild rættiliga saltur, meðan tann feskasti sjógvurin var eystanfyri. Samstundis var sjógvurin heitastur heilt inn móti landi í Vágahavinum, meðan hann var kaldari inn móti landi eystanfyri. Hetta bendir á, at sjógvurin nýliga er komin inn á landgrunnin í Vágahavinum, leggja teir aftrat.

### Æti í sjónum

Tríggjar dagar, áðrenn túrurin hjá Magnusi Heinason byrjaði, vístu mátingar í Skopunarfirði stórar nøgdir av plantuæti, men kanningarnar vístu, at plantuætið minkaði rættiliga ógvusliga í døgunum, meðan túrurin varði.

- Vit byrjaðu mátingarnar eystanfyri Sandoynna, fóru síðan í Suðuroyarfjørð og hildu eftir tað norðureftir eystanfyri og síðan runt landgrunnin.

Teir siga, at samanumtikið er árið 2009 eitt gott ár til gróður á landgrunninum.

- Gróðurin kom tíðliga í ár, og gróður var í alt vár. Sum heild hevur væl verið av plantuæti, heilt frá tíðliga í vár og til miðjan juni - hóast lítið av plantuæti varð mátað á túrinum, siga teir.

Jákup Reinert og Eilif Gaard vísa á, at undir landi eystanfyri og norðanfyri var sera lítið av djóraæti, tó at føðiviðurskiftini hava verið góð í vár og í summar.

- Sannlíkt tykist vera, at djóraætið verður etið. Úti á var væl av reyðæti allastaðni, og undir landi øktust nøgdirnar av reyðæti, tá vit komu vestur móti Mýlingsgrunninum, og nøgdirnar vuksu enn meira í Vágahavinum, Sandshavinum og vestanfyri Suðuroynna.

Úti á var væl av reyðæti

Hetta ljóðar sera áhugavert, tá Jákup og Eilif samstundis siga í síni frágreiðing, at reyðæti var høvuðsføðin hjá toska- og hýsuynglinum.

- Sum heild át fiskurin nógv. Sjálvt á støðum, har heilt lítið var av djóraæti í sjónum, hevði fiskayngulin hampuliga nógv í magunum, og bert fáir magar vóru tómir. Møguliga hava støddirnar á fiskinum týdning, tí stórur yngul svimur skjótari og er tí helst betri førur fyri at leita meira víða eftir føði enn smærri fiskur, siga Jákup Reinert og Eilif Gaard í frágreiðing síni.